Tórshavn 23. februar 2015

**Mikudagin TANN 15. apríl verður ráðstevna á Hotel Føroyum um multiresistentar bakteriur og antibiotikaresistens**

Átøkini, ið verða framd til tess at fyribyrgja spjaðing av MRSA (Methicillin resistente Staphylococcus areus) í Føroyum, eru grundað á leiðreglur hjá Sundhedsstyrelsen: Vejledning om forebyggelse af spredning af MRSA, Sundhedsstyrelsen 2012.
Higartil er eydnast at avmarkað spjaðingini av MRSA.
Ein orsøk til at vit kortini finna MRSA og aðrar vandabakteriur kann vera regluliga samstarvið við danska heilsuverkið, har sjúklingar úr Føroyum verða viðgjørdir á sjúkrahúsum í Danmark. Onnur orsøkin kann vera, at lutfalsliga nógvir føroyingar ferðast og arbeiða í londum, har MRSA og multiresistentar bakteriur (MRB) oftari koma fyri.
Seinastu tvey - trý árini er talið av sjúkrahúsinfektiónum økt, og er tað serliga ESBL (Extended spectrum beta-lactamase), ið hava elvt til økingina. Higartil eru VRE (Vancomycin resistente enterococcer), Clostridium difficile T027, GRE (Gentamycin resistente enterobakterier), CRE (Carbapenem resistente enterobakterier) ella aðrar multiresistentar bakteriur ikki komnar fyri.
Tað er valla hugsandi, at vit kunna forða fyri, at MRB fer at økjast, men væntandi kunna vit avmarkað trupulleikan, um vit hava miðvís smittufyribyrgjandi tiltøk, og halda fast við ein tálmandi antibiotikapolitikk.
Endamálið við MRB-ráðstevnuni er at kunna um vaksandi trupulleikan og at geva íblástur til at herða tiltøkini ímóti MRB.
Málbólkurin umfatar læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og onnur heilsustarvsfólk í primera- og sekundera heilsuøkinum, tannlæknar, djóralæknar, starvsfólk og lesandi á Fróð-skaparsetur Føroya og starvsfólk á Heilsufrøðiligu starvsstovuni og apoteksverkinum

Tiltakið er fyriskipað av Heilsumálaráðnum, og er lagt til rættis av Smittuverjunevndini á Landssjúkrahúsinum saman við MRB-bólkinum, ið samskipar virkisætlanina fyri alt landið.

## RÁÐSTEVNUSKRÁ

| | |
|---|---|
| **Kl. 09.00** | **Skráseting, kaffi, te og rundstykkir** |
| **Kl. 09.45** | **Karsten Hansen**, heilsumálaráðharri, setir ráðstevnuna |
| **Kl. 10.00** | **MRSA, eru vit um at geva skarvin yvir?**<br>**Robert Skov**, Mikrobiologur, yvirlækni, Afdelingen for Antibiotikaresistens & Sygehushygiejne, Mikrobiologi og diagnostik, Statens Serum Institut |
| **Kl. 10.45** | **MRSA CC 398 – ein yrkislig og samfelagslig avbjóðing**<br>**Tinna Urth**, Smittuverjufrøðingur og serfrøðingur í MRSA, Mikrobiologi & Infektionskontrol, Central Enhed for Infektionshygiejne, Statens Serum Institut |

**Kl. 11.30** **Hvussu álvarsliga eiga vit at taka trupulleikan av multiresistentum bakterium?**
**Niels Frimodt-Møller**, Professor, dr. med., klinikchef, Klinisk Mikrobiologisk Afdeling, Diagnostisk Center, Rigshospitalet

**Kl. 12.15** **Miðmáli**

**Kl. 12.45** **Útbreiðslan av antibiotikaresistentum tarmbakterium í Føroyum**
**Marita Debes**, medisinskur bakteriologur, PhD lesandi, Heilsufrøðiliga starvsstovan & University of Iceland

**Kl. 13.15** **Er vandi fyri, at MRB verður ein heilsulig hóttan í Føroyum?**
**Kåre Mølbak**, yvirlækni, dr.med., afdelingschef, Infektionsepidemiologi, Statens Serum Institut

**Kl. 14.00** **Hvørjar viðgerðaravbjóðingar kunna vit vænta okkum av MRB?**
**Shahin Gaini**, infektiónsmedisinari, PhD, yvirlækni á Medisinska Deplinum, Landssjúkrahúsið

**Kl. 14.20** **Drekkamunnur**

**Kl. 14.50** **Hvussu eigur kommunulæknin at fara um MRB?**
**Djóni Sandberg Joensen**, kommunulækni í Kollafirði

**Kl. 15.20** **MRB – en nýggj smittuverjuavbjóðing**
**William Smith**, smittuverjufrøðingur, Heilsuverk Føroya

**Kl. 15.50** **MRB-virkisætlanin í Føroyum**
**Torkil á Steig**, nefrologur, yvirlækni á Medisinska deplinum, Landssjúkrahúsið

**Kl. 16.20** **Pallborðskjak**
Kjakið endar í seinasta lagi kl. 17.00

**PROGRAM**
**Program**

**Kl. 09.00** **Registrering, morgenkaffe**

**Kl. 09.45** **Sundhedsminister Karsten Hansen**, åbner kongressen

**Kl. 10.00** **MRSA, hvor tæt er vi på at kaste håndklædet i ringen?**
**Robert Skov** Mikrobiolog, overlæge i Afdelingen for Antibiotikaresistens & Sygehushygiejne, Mikrobiologi og diagnostik, Statens Serum Institut

**Kl. 10.45** **MRSA CC 398 – en faglig og samfundsmæssig udfordring**
**Tinna Urth**, Hygiejnesygeplejerske med MRSA som speciale, Mikrobiologi & Infektionskontrol, Central Enhed for Infektionshygiejne, Statens Serum Institut

**Kl. 11.30** **Hvor alvorligt skal vi tage problemet med multiresistente bakterier?**
**Niels Frimodt-Møller**, Professor, klinikchef , Klinisk Mikrobiologisk Afdeling, Diagnostisk Center, Rigshospitalet

**Kl. 12.15** **Frokost**

**Kl. 12.45** **Forekomst af antibiotikaresistente tarmbakterier på Færøerne**
**Marita Debes**, bakteriolog, PhD studerende, Fødevarekontrollen på Færøerne & University of Iceland

**Kl. 13.15** **Skal vi forvente, at MRB kommer til at udgøre en sundhedsmæssig trussel på Færøerne?**
**Kåre Mølbak**, Overlæge, dr.med., afdelingschef, Infektionsepidemiologi, Statens Serum Institut

**Kl. 14.00** **Hvilke behandlingsmæssige udfordringer, forårsaget af MRB, står vi overfor?**
**Shahin Gaini**, overlæge, infektionsmediciner, PhD, Medisinsk center, Landssjúkrahúsið, Færøerne

**Kl. 14.20** **Kaffe/te**

**Kl. 14.50** **Håndtering af MRB i almen praksis**
**Djóni Sandberg Joensen**, praktiserende læge, Kollafjørður, Færøerne

**Kl. 15.20** **MRB – en ny udfordring til infektionshygiejnen**
**William Smith**, hygiejnesygeplejerske, Heilsuverk Føroya

**Kl. 15.50** **MRB-virkisætlanin í Føroyum**
**Torkil á Steig**, nefrologur, yvirlækni á Medisinska deplinum, Landssjúkrahúsið

**Kl. 16.25** **Paneldiskussion v. foredragsholderne.**
Paneldiskussionen afsluttes senest kl. 17.00

---

**gev gætur**

**Dagfeseting, tíð:** Mikudagin 15. april 2015 kl. 09.00 – 18.00
**Stað:** Hotel Føroyar, Tórshavn

**Fyriskipari:** Heilsumálaráðið
**Fyrireikari:** Smittuverjunevndin á Landssjúkrahúsinum og MRB-bólkurin

**Kostnaður:** Kr. 700,- kr.

**Tilmelding:** Tilmelding skal verða gjørd á telduposti til Katrin Joensen, fulltrúi **kjj@ls.fo**

Skrásetingin verður gjørd við at flyta ráðstevnukostnaðan, kr.700,- á kontu nr. **6460-1834756** í Bank Nordik.

Í fráboðannarteigin hjá kontueigaranum skalt tú skriva **títt navn og'MRB**'.

**OBS: Tilmeldingin er bindandi**

**Tilmeldingarfreist:** 2. mars 2015.

**Luttakaratal:** Í mesta lagi 250. Tilmeldingin er bindandi

**Spurningar um ráðstevnuna verða settir til William Smith lswilsm@ls.fo Tlf. 00298 234585**